## Islamisma – ein nýggj global hóttan?

**Mánakvøldið 10. apríl kl. 19 í Miðlahúsinum fer danski journalisturin og rithøvundurin Martin Krasnik at halda fyrilestur um islam sum politiska hugsjón við støði í nýggju bók síni *"De retfærdige. En islamisk stafet"*. Eftir fyrilesturin verður kjak á skránni**

FYRILESTUR

Islamistarnir. Í altjóða fjølmiðlum hoyra vit um teir hvønn dag. Vit hoyra, at politiskt islam er nýggi hugsjónarligi høvuðsfiggindi vesturheimsins og hóttir okkara siðmenning. Vit hoyra, at stóri samanstoyturin millum vesturheimin og muslimska heimin gerst alt meiri sjónligur, ikki minst í kjalarvørrinum av, at tólv tekningar í Jyllandspostinum í heyst elvdu til østar mannamúgvur, mótmælisgongur, harðskap og brennandi danskar sendistovur í arabiska heiminum. Men hvørjir eru islamistarnir í veruleikanum? Og hvør er teirra hugsjón?

Fyrrverandi Deadline-verturin á DR og núverandi korrespondenturin hjá Weekendavisen, Martin Krasnik, fór í 2004 til arabiska heimin fyri at hitta og hava samrøður við politiskar og átrúnaðarligar leiðarar. Undir rannsóknarferð hansara gjøgnum London, Iran, Libanon, Pakistan og Saudi-Arabia samrøddi Krasnik við hesar leiðarar um politikk, átrúnað, kærleika, lív og deyða. Og ikki minst fyri at spyrja: kunnu vit liva saman í friði?

Úrslitið av ferðini var bókin *"De retfærdige. En islamisk stafet"*, sum kom út beint undan jólum, og **mánakvøldið 10. apríl kl. 19 í Miðlahúsinum** fer Martin Krasnik at greiða nærri frá síni bók, síni ferð gjøgnum arabiska heimin og sínum hugsanum um politisku viðurskiftini í og millum muslimska heimin og vesturheimin. Eftir fyrilesturin verða spurningar og kjak.

## Anna David í Eclipse

**Danska songkvinnan Anna David fer at framføra sangin Fuck dig!, og av sínum vælumtóktu sangum í Eclipse leygarkvøldið, tá eigaraskiftið verður hátíðarhildið**

NÁTTARLÍV

*Niels Uni Dam*

*nielsuni@sosialurin.fo*

Leygarkvøldið siga gomlu náttarkongarnir í Havn farvæl, og nýggju eigararnir av Café Natúr, REX og Eclipse siga gott kvøld. Kvøldið verður ein risa veitsla, har tað besta innan føroyskan tónleik fer á pallin í REX, og eitt tað heitasta danska poppnavnið Anna David fer á pallin í Eclipse.

Danska songkvinnan Anna David er best kend frá lagnum Fuck Dig, ið hevur verið ein sonn landaplága í Danmark, og eisini hevur klára seg væl á 15 teimum bestu. Havgrímur Johannesen sigur, at hetta er eitt serligt kvøld bæði fyri nýggju og gomlu eigararnar, tí verður tað hátíðarhildið ordiligt. Hann sigur, at Anna David fer á pallin við bólki og dansarum um tvey tíðina um náttina.

Í REX spælir Spaðar 5, við hópin av gestasangarum og tónleikarum m.a. Terja Rasmussen, Kim Hansen, Jens Marna Hansen, James Olsen og Ólavi Olsen.

Havgrímur sigur, at tað er við blandaðum kenslum, at hann letur hetta virksemið frá sær. Frá at vera ovbyrjaður verður hann knappiliga arbeiðsleysur, og til reiðar til nýggjar avbjóðingar, hetta er spennandi í sær sjálvum. Men arbeiðið í náttarlívinum í Havn hevur eisini verið stuttligt.

Havgrímur sigur, at serliga stuttligt er at hava møguleikan at gevast á toppinum, tað gongur øgiliga væl fyri tíðina, og tað er tí stuttligt at kunna geva ein væl koyrandi virki víðari.

# Stuðul til stórfamiljubilar er eitt ferðslutrygdargott uppskot

**Ráðið fyri Ferðslutrygd heitir á politikarar um at hava ferðslutrygdina í huga, nú uppskot frá Miðflokkinum er í tinginum um at lata stuðul til stórfamiljubilar**

FERÐSLUTRYGD

*Eirikur Lindenskov*

*eirikur@sosialurin.fo*

Í sambandi við lógaruppskotið um at veita stuðul til stórfamiljubilar, hevur Ráðið fyri Ferðslutrygd vent sær til hini norðurlondini við fyrispurningi, um líknandi tiltøk finnast har.

Ferðslutrygd sigur, at svar eru komin úr Íslandi, Danmark, Noregi og Finnlandi og staðfestast kann, at eingin slík skipan finst í hesum londunum. Men í svarinum verður undirstrikað, at uppskotið er skilagott.

Stjórin í danska ráðnum fyri ferðslutrygd, René La Cour Sell, heldur uppskotið vera so gott, at hann ætlar at royna at fáa tað við í politiska kjakið í Danmark. Tað sama ætlar stjórin í finska ráðnum fyri ferðslutrygd at gera.

Frá 2009 koma EU krøvum, at øll í bilinum skulu bindast í bilbelti. Hesum krøvum eiga vit í Føroyum sjálvsagt at fylgja.

– Nú hetta uppskot er til viðgerðar í løgtinginum, heitir Ráðið fyri Ferðslutrygd á politikararnar um at hava ferðslutrygdina í huga.

# Aftur í 60 árini fyri næst seinastu ferð

**Hondbóltsfelagið Neistin hevur gjørt av, at tiltakið Aftur í 60 árini nú lækkar ímóti endanum. Leygarkvøldið 29. apríl er nítjanda árið á rað, at felagið skipar fyri hesum vælumtókta tiltaki**

60'INI

*Tíðindaskriv*



Robert McBirnie



Thunderbirds úr Vestmanna

35000 atgongumerki er seld hesi árini, og eingin ivi er um, at vit í Neistanum einaferð um árið hava skylda trúgvu "dansarunum" hetta tiltakið. Vit eru øll vorðin góð við Aftur í 60 árini og harvið dansifólkið. Tað koma so nógv fólk allastaðni úr Føroyum, at tað ikki bara er inntøkan, sum fær okkum at skipa fyri tiltakinum.

Nú hava vit so gjørt av, at tiltakið Aftur í 60 árini verður fyriskipað fyri næst seinastu ferð leygarkvøldið 29. apríl. Næsta ár eru tað tjúga ár liðin, síðani Neistin fyrstu ferð skipaði fyri tiltakinum.

Tað var í 1988, at Robert McBirnie frá Faroe Boys, Vagnur Michelsen frá Neistanum og Robert Magnussen og Einar Vesturklett frá Twilight, løgdu lunnur undir Aftur í 60 árini. Teir vildu fyriskipa eitt 60 ára tiltak, sum var øðrvísi enn bara vanligur dansur. Skrá skuldi gerast, borð setast í høllina, ja, skulu hugna sær og føla seg væl, tað veri seg um tey dansaðu ella sótu við borðini og lurtaðu eftir 60-ára tónleiki.

Ætlanin var bara við einum 60 ára kvøldi í 1988, men eftirspurningur var so stórur eftir atgongumerkjum til fríggjakvøldið, at tiltakið í 1988 var bæði fríggjakvøld og leygarkvøld.

Neistin hevur hesi árini savnað sama nógvar 60 ára bólkar, sum vóru givnir at spæla. 60 ára bólkarnir, sum hava spælt hesi átjan árini eru: Faroe Boys, Cream Crackers, Goggan, Silly Boys, Islanders, Rúnar, Thunderbirds, X-rays, Flamingo, Enjoyers og Tey av Kamarinum. Í ár spæla Thunderbirds og Robert og vinmenn.

Onkur spyrói vað, hví Neistin næsta ár gevst við 60 ára tiltakinum. Tónleikararnir, sum spældu í 60 árunum verða ikki yngri sum árini ganga, ja, fleiri teirra eru ikki millum okkum longur. Trúgvu "dansararnir" eldast eisini, og tey, sum í 1988 vóru kanska fimti ár nú er sjeyti ár.

Tí hevur Neistin gjørt av, at í 2007 verður tiltakið fyri tjúgundi og seinastu ferð. Punktum og finala fyri ógloymandi løtuna bæði fyri tónleikarar, dansarar og fyrireikarar. Leygarkvøldið 29. apríl spæla Thunderbirds og Robert og vinmenn, har Jógvan Dahl úr Faroe Boys er ein av vinmonnunum.

# Kórkonsert við sangarum úr Fuglafirði

**Leygardagin 8. apríl kl. 16:00 hevur Føroyskt kamarkór-Atlantic Voices konsert í Fríðrikskirkjuni**

KONSERT

*Tíðindaskriv*

Sama dag kl. 20:00 verður konsert í Fuglafjarðar kirkju.

Kórið fer á konsertferð til Reykjavíkar og New York. Kórið telur 20 sangarar, flestu teirra eru úr Fuglafirði og nakrir aðrastaðni frá í Føroyum. Kórið hevur fingið innbjóðing frá the First Moravian Church at koma yvir og hava nakrar konsertir í New York

Kórleiðari er Frits Johannesen, orgulfylgispæl og klaverfylgispæl hava Heðin Kambsdal og Eyðun á Lakjuni.

